HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 27. apríl 2017 kl. 16:00

Á fundinum vóru:	Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún, Bjørghild Djurhuus og Manne Persson
Avboð:	Bogi Andreasen
Skrivari:	Hans Jón Thomsen

Skrá

Vit fylgja upp á fundarfrágreiðingina frá skúlastýrisfundinum hósdagin 9. mars 2017

Hegnið er tikið niður runt um sparkivøllin í Hoyvíkar skúla. Stórur tørvur er á at fáa nýtt hegn sett upp. Skúlastýrislimur setur seg í samband við Tórshavnar kommunu og roynir at fáa Húsaumsitingina at gera skjótt av, soleiðis at nýtt hegn/garður verður settur upp rundan um sparkivøllin. Hetta er eisini avgerandi fyri at fáa trygdina aftur í lagi.

Borgarstjórin og forkvinnan í mentamáladeildini í Tórshavnar kommunu vitja Hoyvíkar skúla hósdagin 18. mai 2017. Jeanette Blåsvær, forkvinna, Malan Mikkelsen, næstforkvinna, og Hans Jón Thomsen, skúlastjóri, luttaka vegna Hoyvíkar skúla.

Tórshavnar kommuna kannar í løtuni møguleikarnar at gera eina trivnaðarkanning á øllum skúlum í Tórshavnar kommunu. Hetta arbeiðið verður møguliga gjørt í samráð og samstarvi við Mentamálaráðið. Hoyvíkar skúli bíðar við at gera eina tílíka trivnaðarkanning, fyrr enn vit vita við vissu, hvussu verður við trivnaðarkanningini hjá Tórshavnar kommunu.

Endaligu fyrireikingarnar vera nú gjørdar við at seta nýggju klintripyramiduna upp í skúlagarðinum í Hoyvíkar skúla. Væntast kann, at nýggja pyramidan verður sett upp fyrst í mai mánaði.

Forkvinnan kunnar um fund á Tórshavnar kommunu

Forkvinnan hevur verið á fundi saman við øðrum formonnum og forkvinnum í Tórshavnar kommunu. Kunnað varð um innihaldið á fundinum.

Forkvinnan kunnar um aðalfund hjá felagnum Heim og skúla

Forkvinnan hevur verið á aðalfundi hjá felagnum Heim og skúli. Kunnað varð um innihaldið á aðalfundinum.

Fundurin lokin kl. 18:30